# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Russland og USA eru ikki deyðsfíggindar longur, og tí ætli eg mær at tosa um avvápnað, verði eg forseti*
*(John McCain)*

# 60 ár við mannarættindabrotum mugu enda nú



*Í mars vóru mannarættindastríðsfólk og andstøðupolitikarar í gøtunum í Moskva, har tey kravdu, at myndugleikarnir skulu virða mannarættindini. Tað gera russisku myndugleikarnir ikki, sigur Amnesty International*
*(Mynd: Polfoto)*

**Í dag eru 60 ár, síðani altjóða mannarættindasáttmálin varð samtyktur, men sambært Amnesty International er langt á mál**

Í sambandi við 60 ára dagin hevur Amnesty International almannakunngjørt eina nýggja frágreiðing, og har fáa heimsins stjórnarleiðarar av grovfílini. Sagt verður, at leiðararnir mugu taka leiðsluna í mannarættindaarbeiðinum, at fólk framvegis verða pínd ella illa viðfarin í minst 81 londum, at fólk verða órættvíst dømd í minst 54 londum, og at í minst 77 londum hava fólk talufrælsi.

Amnesty International sigur, at 2007 var merkt av fólksliga bardaganum fyri mannarættindum, ið til dømis fór fram millum munkar í Myanmar (Burma) og advokatar í Pakistan. Men árið í fjør var eisini merkt av, at stjórnir í vesturheiminum vístu seg at vera máttleysar og trekar at taka sær av nøkrum av heimsins mest álvarsomu mannarættindakreppum. Ófriðurin og yvirgangurin í Darfur, Zimbabwe, Gaza, Irak og Myanmar krevja, at farið verður til verka á altjóða støði alt fyri eitt, sigur felagsskapurin.

### Mugu ganga undan

Amnesty International ávarar um, at størsta hóttanin móti mannarættindunum er fráveran av einari felags alheimsvisión og einari alheimsleiðslu.

- Órættvísi, ójavni og revsifrælsi eyðkenna heimin í dag. Men 2008 umboðar ein søguligan møguleika fyri at fara nýggjar leiðir og vraka trongskygda politikkin, sum seinastu árini hevur gjørt heimin til eitt meira vandamikið og syndrað stað. Ráðandi londini mugu vísa seg sum fyrimyndir og ganga á odda, segði Irene Khan, aðalskrivari, tá frágreiðingin varð løgd fram.

- Heimsins stjórnarleiðarar avsanna veruleikan. Hesin atburður kostar dýrt. Sum Irak og Afghanistan hava víst okkum, eru mannarættindatrupulleikar ikki einstaddir sorgarleikir. Teir eru sum virus, sum kunnu spjaðast skjótt, so vit øll koma í vanda, segði Irene Khan.

*(Kelda: AI, Føroya deild)*

# Minst hálvt ár afturat í húsavarðhaldi

**Altjóða samfelagið fordømir avgerðina hjá burmesiska stýrinum at halda Aung San Suu Kyi í húsavarðhaldi**

Aung San Suu Kyi skal sita í húsavarðhaldi í Rangoon í seks mánaðir afturat - fyribils.

Ta avgerðina tók hernaðarstýrið í Burma í gjár. Aung San Suu Kyi hevur sitið í húsavarðhaldi uttan steðg síðani tann 30. mai í 2003, og tilsamans hevur hon verið í húsavarðhaldi í 12 ár síðani 1990.

ST, ES og USA hava hvassliga forsømt avgerðina hjá hernaðarstýrinum at leingja húsavarðhaldið. Ban Ki-Moon, ST-aðalskrivari, sigur seg harmast avgerðina, og ES-talsmaðurin Piero Fassino sigur, at avgerðin er púra ógrundað og kann ikki góðtakast. George W. Bush, forseti, hevur heitt á hernaðarstýrið um at endurskoða sína avgerð og at lata allar politiskar fangar leysar.



*Aung San Suu Kyi verður verandi í húsavarðhaldi*
*(Mynd: Polfoto)*

## STUTT SAGT

### Olmert fekk pengar í hondina

Skuldsetingarnar um fíggjarligt óreglusemi regna oman yvir ísraelska forsætisráðharran, Ehud Olmert. Í gjár greiddi amerikanski ríkmaðurin Morris Talinsky rættinum í Tel Aviv frá, at hann hevði latið valgrunninum hjá Olmert 150.000 dollarar. Spurdur, hvussu hann hevði goldið pengingin, svaraði maðurin, at Olmert hevði fingið teir í hondina. Morris Talinsky er amerikanskur jødi. Hann segði, at hann hevur alla tíðina hildið nógv av Olmert, og at hann gav honum pengarnar, tá Olmert stillaði upp til borgarstjóravalið í Jerusalem í 1993 og 1998. Hinvegin avsannaði hann, at hann hevði fingið nakað afturfyri, og tað hevði hann heldur ongantíð ætlað sær, segði hann.



*Tað stendur nógv á Ehud Olmert í hesum døgum*
*(Mynd: Polfoto)*

### Fekk grið men ov seint

Í 1922 varð avstraliumaðurin Colin Campbell dømdur til deyða og hongdur, eftir at rætturin hevði dømt hann sekan í at hava neyðtikið og myrt eina 12 ára gamla gentu. Colin Campbell noktaði seg sekan, og hóast onnur vitnaðu, at hann hevði ikki verið á drápsstaðnum, tá gentan bleiv neyðtikin og myrd, bleiv hann dømdur sekur. Í rættinum legði ákæruvaldið fram nøkur hár, sum løgreglan hevði funnið á teppinum heima hjá Campbell, og sum sambært løgregluni stavaðu frá teirri 12 ára gomlu Onnu Tirschke.

Nú hava DNA-kanningar staðfest, at hárini vóru ikki av Onnu Tirschke. Tí hevur Colin Campbell fingið grið - 86 ár ov seint.